





# *Lova – næstan – hvít jól í Danmark*



**Desember mánaður verður helst so kaldur, at ein partur av kavanum fer at liggja fram móti jólum, og kanska heilt til nýggjárs í Danmark. Tað meta veðurfrøðingarnir hjá donsku veðurstovuni.**

Møguleikarnir fyri hvítum jólum er rættiliga góður í ár.

Í eini nýggjari meting fer kuldin at loysa sítt jarntak eitt sindur, men kortini ikki so mikið, at kavin hvørvur undan jólum.

Danska veðurstovan hevur biðið veðurfrøðingin, Jesper Rasmussen at meta um sannlíkindini fyri hvítum jólum.

Við kortum frá europeisku veðurmiðstøðini í hondini, sigur hann:

– Hesa ferð er líkt til, at partur av kavanum sum liggur nú, verður liggjandi fram til jóla.

Óhugsandi er ikki, at bæði jólini og nýggjárið verða hvít í ár.

– Í desember í ár fáa vit í størstan mun luftrák haðani tað er kalt. Tí verður tað trupult at toga temperaturin upp um frostmarkið.

– Hóast hitin eitt skiftið fer at liggja beint omanfyri 0 stig, er rættiliga nógvur kavi sum skal bráðna fyrst. So heitt verður tað neyvan, sigur Jesper Rasmussen.

snorri@sosialurin.fo